# Steypakappingin útsett

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Steypakappingin um Løgmanssteypið hjá monnum skuldi eftir ætlan fara av bakkastokki komandi sunnudag. Hetta er nú útsett til næsta leygardag 23. mars.

Vegna vánaligt veður hava innleiðandi dystirnir ikki kunnað verið spældir til tíðina. Tí hevur kappingarnevndin gjørt eitt nýtt dystaryvirlit, har bólkaspælið hjá monnum byrjar 23. mars ístaðinfyri 17.

Kappingarnevndin hevur valt at leggja dystirnar leygardag, tí um veðrið ikki er til vildar tann dagin, kunnu dystirnir spælast sunnudag.

Leygardagin verða teir seinastu innleiðandi dystirnir spældir. Tá spælir Sumba ímóti B71 á Krossinum, og FS Vágar tekur ímóti AB.

Hjá kvinnum eru dystirnir fluttir frá leygardegi til sunnudag, tí gentur 14-17 spæla landskapping leygardag.

# Spæla kortini

Eftir at árliga Klaksvíkskappingin varð avlýst vegna veður seinasta vikuskiftið, røkist nú kortini fyri, at kappingin kann avgreiðast.

Vánaliga veðrið hevði nevnliga við sær, at mest sum allur fótbóltur kring landið varð avlýstur, og tískil kann bólkaspælið í steypakappingini ikki fara fram sum ætlað.

Tí hevur KÍ spurt seg fyri hjá hinum luttakarunum í kappingini, og á heimasíðuni hjá KÍ verður sagt, at øll tóku av alt fyri eitt.

Tveir dystir verða leiktir bæði leygar- og sunnudagin. Leygardagin spæla GÍ og B36 kl. 14.00 og HB og KÍ kl. 16.00.

Sunnudagin verður so dysturin um 3. plássið klokkan 13.00, meðan sjálv finalan verður leikt kl. 15.00.

*-jm*

# Fimleikaframsýning hjá Ljósinum

FIMLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Sunnudagin klokkan 16 hevur fimleikafelagið Ljósið framsýning í høllini á Hálsi. Hetta er ein innanhýsis framsýning og ikki ein kapping.

Hetta er árliga framsýningin, har øll liðini sýna fram, tað ið tey hava vant gjøgnum veturin. Ljósið hevur umleið 600 limir.

# Stór FM-kapping í boccia

**Um vikuskiftið skipaði ÍSB og Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli fyri FM – kapping í boccia**

BOCCIA
*Tíðindaskriv*

Sløk fimti ítróttafólk høvdu leitað sær niðan í Badmintonhøllina henda dagin, og spenningurin var stórur.

Kappast var í trimum bólkum. Rørslutarnað og menningartarnað vóru í hvør sínum bólki. Og á fyrsta sinni var FM fyri unglingar eisini á skránni.



*Hjá kvinnunum gjørdist Hjørdist Gaard úr Klaksvík føroyameistari*

### Unn føroyameistari triðja árið á rað

Í kappingini fyri menningartarnað varð kappast í trimum innleiðandi bólkum. Tvey tey stinnastu í hvørjum bólki fóru víðari í endaspælið. Og í fleiri bólkum var sera javnt.

Tá ið leikur var lokin var tað Unn Mortensen úr Øravík, sum hevði vunnið FM-heitið triðja árið á rað. Unn var einastandandi henda dagin, hon leikti tíggju dystir, hon vann níggju og tapti ein. Í finaluni vann hon 4–0 á Símun Petur Zachariasen úr Klaksvík. Dystin um triðja plássið vann Øssur Guðmundson úr Tórshavn á Arnold Grundveig úr Vík.

### Áki vann kappingina fyri rørslutarnað

Tey rørslutarnaðu kappaðust í tveimum innleiðandi bólkum. Og hóast fleiri nýggj andlit vóru við í hesi kappingini, so vóru tað teir gomlu og royndu boccileikararnir, ið drógu longsta stráðið.

Áki Joensen, sum gongur í triðja flokki í Hoydølum, og sum situr í koyristóli vann finaluumfarið og streyk avstað við gullmerkinum. Nummar tvey gjørdist Jógvan Telling, nummar trý gjørdist Marius Johansen, og nummar fýra varð Sámal Jacobsen. At Áki sigraði henda dagin er eitt stórt bragd, tí hann hevur eitt brek, ið er væl størri enn hjá mótstøðumonnunum.

### Hjørdis gjørdist unglingameistari

Hjørdis, sum er ættað úr Klaksvík, gjørdist fyrsti unglingameistari í søgu sersambandsins. Hjørdist leikti stak væl henda dagin, hon var støðug, vann fýra dystir, leikti ein javnan og tapti ein dyst. Henni á baki var Jan Dávur úr Kollafirði. Og nummar trý varð heldur óvæntað stóri favoritturin Dánial Jákup av Strondum, sum hevur sjáldsama góð evni sum boccialeikari.

### Uttanlands at royna seg í bocciaspælinum

Føroyska landsliðið fyri rørslutarnað fer síðst í mai mánaða til Malmø at dystast í NM-kappingini. Føroyingar hava áður staðið seg avbera væl í hesi kapping. Tá ið kappast var um NM-heitið í Íslandi fyri tveimum árum síðan, fingu føroyingar tveir norðurlandameistarar. Àki Joensen og Jógvan Telling komu báðir aftur til landið, við gullmerkjum um hálsin.

Føroyska landsliðið fyri menningartarnað skal í september vera við í Danish Open, sum verður í Struer á Jútlandi.

Búnaðardepilin og Føroya Lívstrygging stuðlaðu tiltakinum.

# Leikarar læra reglurnar

**Áðrenn fótbólturin rættuliga fer í gongd, er gott hjá leikarum at verða mintir á spælireglurnar. Og í vikuni hava VB leikarar fingið orð dómarans um gult og reytt, men hetta er fyri at fyribyrgja, heldur enn revsa**

ÍTRÓTTUR
*Dagfinn Olsen*

Tað styttist til fótbóltsárið verður sett ígongd. Og av royndum vita leikarar, at óynsktu gulu og reyðu kortini ikki eru løtt at koma uttan um, tá menn gerast heitir.

Men hóast ymiskt er, hvussu væl ella illa feløg og leikarar eru roynd, so er ein roynd at fyribyrgja altíð gott hugskot og í vikuni vóru tað leikarar í Suðuroynni, ið fingu tilboðið.

Jens Petur Brattalíð, dómari, hevur boðið liðunum í oynni til fyrilestur um fótbóltsreglurnar, sonevndu Stevnuna, ið dómarar halda seg til.

Fyribils hava TB og VB tikið av og týskvøldið vóru tað VB-leikarar, ið hoyrdu um gulu og reyðu kortini og hvussu ein best sleppur undan at hoyra meira um tey, tá leikárið byrjar.



*Jens Petur Brattalíð, dómari, greiðir frá, hvussu ein best sleppur undan at hoyra meira um litaðu kortini, tá leikárið byrjar*

*Mynd: D.Olsen*











## Dagrøktari

Søkt verður eftir dagrøktara sum avloysara til Dagrøktina í Hósvíkar kommunu at byrja skjótast gjørligt.

Nærri fæst at vita við at venda sær til leiðaran.
Tlf. 422416 – 253550 – 422435.

**Dagrøktaskipanin**
í Hósvíkar Kommunu

## Pedagogur

Søkt verður eftir avloysara fyri pedagog í barnsburðarfarloyvið at arbeiða 40 tímar um vikuna. **Starvið er frá 15. apríl 2002 til 31. januar 2003.**

Starvið inniber at umsøkjarin er opin fyri at fylgja tí tilrættalagda arbeiðinum, má kunna arbeiða skiftandi tíðir, bæði kvøld- og náttarvaktir, má kunna arbeiða sjálvstøðugt og kunna samstarva.

Arbeiðsplássið er eitt sambýli har 5 menningartarnað fólk búgva.

Løn og setunarviðurskifti eru samb. sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag. Um eingin skikkaður pedagogur søkir, verður starvið sett av fólki við øðrum førleika

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við leiðaran á tlf. 374074

Umsóknarfreistin er 1. apríl 2002

Umsóknir skulu sendast til:

**Sambýlið á Bárðarfløtti**
FR-900 Vágur
Att: Leiðarin
Tlf. 374074

## Vaskikona

Søkt verður eftir vaskikonu at byrja beinanvegin.

**Klaksvíkar Klubbi**
Uppsalagøta 11 · Box 182
Klaksvík

## Seyðahús í Fuglafirði til sølu

Stórt nýmótans seyðahús í Fuglafirði til sølu um hóskandi boð fæst.

Húsini kunnu yvirtakast í mai/juni í ár.

Áhugaði biðjast ringja á

**tlf. 282722 eftir kl. 17**